# Ólavsøkuhárið

**Á ólavsøkuni vilja øll vísa seg frá síni bestu síðu, og fólk gera sum heild nógv fyri at pynta seg til høgtíðina. Hetta merkja hárfríðkanarstovurnar serliga væl, tí tær hava úr at gera, tíðina undan Ólavsøku**

ÓLAVSØKAN
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*



Inni á hárfríðakanarstovuni SaxO'føn í Havn er lagið gott. Tríggir kundar sita í stólunum, og eigarin Guðrun og lærlingur hennara ganga og stákast um kundarnar.

Tær hava tó ikki so nógv at gera, sum eg kanska hevði væntað mær 14 dagar undan ólavsøku.

## Sesongarbeiðið

– Hetta er bara stille før storm, svarar Guðrun. – Vikuna áðrenn ólavsøku verður nógv at gera. Tú veit hvussu føroyingar eru, altíð í seinastu løtu. Men tað vísir seg, at tað er ofta friðarligt beint áðrenn eina stóra høgtíð. T.d. er november mánaður eisini steindeyður, men so koma jólafrokostarnir, og so ganga fólk amokk, sigur hon.

Hon sigur, at beint fyri ólavsøkuna koma øll til frisør, bæði ung og gomul, kvinnur og menn. – Damurnar bíleggja sær ofta tíð nakað áðrenn, meðan menninir typiskt eru í seinastu løtu. Teir koma ikki í tankar um at snøgga sær hárið, fyrr enn tað næstan er for seint, greiðir Guðrun frá.

Guðrun sigur tó, at um summarið er sum heild nógv at gera. Tað eru nógv sum koma heim at ferðast, og tey koma ofta beinanvegin til frisør, táið tey koma heim. So eru nógv brúdleyp um summarið, sum fólk eisini pynta seg til. Fólk hava feriu, og tey vilja hugna sær eitt sindur og forkela seg sjálvi. Summi skulu ferðast, og vilja hava hárið ornað til tað. Og so er tað sjálvandi ólavsøkan.

– Tað er kanska eitt sindur av sesongarbeiði í hesum fakinum. Til ólavsøkuna taka fólk t.d. alla rulluna, við farv og klipp. Eg merki væl, at tey kanska unna sær sjálvum eitt lítið sindur eyka, nú um summarið, sigur Guðrun. – Og so eru jólini og páskirnar, har tað eisini er øgiliga nógv at gera. Hon sigur annars, at føroyingar eru ótrúliga raskir at ganga til frisør. – Tey flestu ganga regluliga, og tað sær mann eisini, tá mann fer út. Tað eru eingi fólk, sum hava ljótt hár – í øllum førum ikki her í Havnini. Fólk leggja í hárið, so vit hava nokk at gera alt árið, sjálvt um tað kanska er eitt sindur eyka, táið stóru høgtíðirnar eru, heldur hon.

Men á ólavsøkuni gera frisørdamurnar ein eyka innsats, fyri at fáa tikið so nógvar kundar sum gjørligt. – Vit plaga at arbeiða tveir tímar longri hvønn einasta dag, vikuna undan ólavsøkuni. Og kanska vit arbeiða eitt sindur skjótari eisini. Eg kundi gott hugsað mær at fingið ein eyka svein inn bara til ta vikuna, men sjálvt um tað er nokk til av frisørum, so eru tær ikki til at uppdríva nú uppundir ólavsøkuna. Vit hava allar líka nógv at gera, sigur Guðrun. – Men, leggur hon afturat, – tað hava vit sum so altíð. Eg havi í øllum førum aldrin hoyrt um eina frisørsalong, sum mátti lata aftur, tí einki var at gera.

## Mótin

*Men hvat skulu fólk biðja um, um tey ynskja at vera modernað á ólavsøku. Hvussu er hármótin júst nú?*

– Vit hava sæð langt, slætt hár við nógvum strípum í ymsum litum í longri tíð nú, og tað langa hárið heldur fram. Men har vit fyrr slættaðu hárið í tunnum banum, fyri at fáa tað ordiliga slætt, taka vit nú størri banar, so hárið fær havt eitt sindur av náttúrligum lívið í, hóast tað verður slættað. So tað vil eg siga: langt hár, við lívið í. Og framvegis strípur. Guðrun sigur, at krúllur eisini eru loyvdar, men vit fara tó ikki at síggja permanentið aftur. Hon sigur, at tað hevði verið ein verri ein, um permanentið kom aftur nú, tí tað hevur verðið so nógv litað seinastu árini, at permanentið allarhelst ikki hevði tikið við í slitna og litaða hárinum hjá føroyingum. – Tað verða ikki permanentkrúllur, men meiri hesar stóru skuespælarakrúllurnar, sum fara at koma fram nú, sigur hon, og snúrar ein fingur niður við vanganum. Annars heldur hon, at stutt, pjuskut hár altíð er smart og vælumtókt.

Føroysku dreingirnir, sum fyri tað mesta hava verið karsekliptir ella skinnaðir, hava nú eisini fingið stíl yvir hárið. Guðrun sigur, at dreingir nú eisini seta seg í stólin, og vita akkurát hvat teir vilja hava. – Dreingjahárið er framvegis stutt, men teir hava hár allíkavæl. Serliga hendan hanakambin, tú veit, greiðir Guðrun frá.

– Men eg veit ikki. Tað vísir seg ofta, at fólk gera seg ordiliga klár til ólavsøkuna, brúka nógvar pengar uppá hárið og keypa sær hvítar skógvar og alt hetta her. Og so kemur ólavsøkan við oysregni, og so hava tey pyntað seg til onga nyttu, sigur Guðrun og rystir við høvdinum. – Tað er eitt sindur keðiligt, staðfestir hon at enda, við einum ironiskum smíli.












